


# Oljutænastuveitari koyrir 11.000 starvsfólk heim

**Jógvan Hugo Gardar**

17.04.2015 - 17:20

Oljan.fo

Heimsins størsta tænastuveitingarfyritøka innan oljuvinnuna, Schlumberger, skal næstu mánaðirnar spara, og 15 prosent av størvunum hvørva. Tað merkir at heili 11.000 starvsfólk missa arbeiði. Schlumberger koyrdi í vetur 9000 starvsfólk heim.

Nýggjastu tíðindini um at 11.000 størv hvørva koma í samband við at fyritøkan kemur við roknskapartølunum fyri fyrsta ársfjórðing. Hesi vísa at rakstrarúrslitið er munandi vikna, og er 30 prosent lægri enn í fjórða ársfjórðingi í 2014.

Schlumberger sigur í einum boðum til íleggjararnar, at tað er eingin ivi um at tað er tann lági oljuprísurin sum rakar fyritøkuna so meint.

Í gjár boðaði norska Aker Solutions at har missa 750 fólk starvið, samstundis sum Maersk Oil hevur boða frá at tey siga 200 fólkum úr starvi